UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Sumbiar kommuna
í Kerinum 27
970 Sumba
Føroyar

Tórshavn, tann 20. mars 2020
J.nr.: 19/00510-5
At tilskila í svari
Viðgjørt: khp
Tygara skriv:

**Broytingar í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Sumbiar kommuna við skrivi dagfestum 15. juli 2019 sent Heilsu- og innlendismálaráðnum t.e. Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu fyri Akraberg, Akrar, Lopra og Víkarbyrgi til góðkenningar.

Talan er um hesar broytingar.

1. Matr. nr. 191c, vídd 507 $m^{2,}$ Akraberg, verður broyttur frá landbúnaði til A sethúsaøki
2. Partur av matr. nr. 29h, Víkarbyrgi, eystanfyri veg bf, verður broyttur til I summarhúsøki
3. Partur av Av og partur av matr. nr. 322, Víkarbyrgi, verður broyttur frá F alment frítíðarøki til J havnarøki
4. Partur av 29e, Víkarbyrgi, eystan fyri 29d, verður broyttur frá I summarhúsaøki til F alment frítíðarøki
5. Partur av 29e, Víkarbyrgi, verður broyttur frá I summarhúsøki til D vegir/parkering.
6. Partur av matr. nr. 29a og 187, Víkarbyrgi, norðan fyri veg AV, verur broyttur frá I summarhúsøki til landbúnaðarøki
7. Partur av matr. nr. 29h, Víkarbyrgi, vestan fyri veg BF, verður broyttur frá I summarhúsøki til landbúnaðarøki
8. Matr nr. BF, Víkarbyrgi, verður broyttur frá I summarhúsøki til D vegir/parkering
9. Matr. nr. 29d, Víkarbyrgi, verður broyttur frá I summarhúsaøki til A sethúsaøki
10. Partur, ca. 430 $m^2$, av matr. nr. 193, Akrar, skal leggjast afturat verandi kirkjugarði til E almenn endamál
11. Partur av matr. nr. 145a, Akrar, verður broyttur frá G frítíðarøki til F alment frítíðarøki
12. Matr. nr. 178b, Lopra, verður broytt frá A sethúsaøki til C vinnuøki
13. Matr. nr. 273, Lopra, verður broyttur frá J havnarøki til A sethúsaøki
14. Partur av matr. nr. 252a og 68b, Lopra, verður broyttur frá A sethúsaøki til landbúnaðarøki
15. Partur av mat. nr. 67b , Lopra, verður broyttur frá F alment frítíðarøki til J havnarøki

16. Matr. nr. 67c, vídd 264 $m^2$, Lopra, verður broyttur frá F alment frítíðar øki til C vinnuligt øki

Uppskotið til broyting byggisamtykt fyri Sumbiar kommunu hevur ligið alment frammi frá 13. mai til 3. juni 2019. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 12. november 2019, hevði einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum dagfestum 12. november 2019 til at góðkenna byggisamtyktina fyri Sumbiar kommunu, sum omanfyri nevnt.

Nevndin vísir tó á, at ítøkiligar broytingar og matr. nr. eiga at framganga av almennu lýsingini, tá ið framtíðar ætlaðar broytingar verða lýstar í byggisamtyktini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir at byggisamtyktin fyri Sumbiar kommunu verður broytt sum omanfyri nevnt.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Heitt verður á Sumbiar kommunu frameftir, tá broytin skal gerast í byggisamtyktini, týðiliga at skila til hvat øki tað er broytingin umfatar. Hetta fyri at tað skal verða so greitt sum gjørligt fyri borgarar at síggja, hvørt broytingarnar viðvíkja teirra egnu ognum og hvat broytingarnar snúgva seg um.

Hjálagt rættað kortskjal fyri Sumbiar kommunu

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

e.h. [signature]

Anni á Hædd
ráðgevi

19/00510

**Býarskipanarnevndin - Álit**

Álit viðv. uppskoti til broyting av almennu byggisamtyktini hjá Sumbiar kommunu
(US mál 19/00790 - HIMR mál nr. 19/00655)

Málið var eisini fyri á seinasta fundi í býarskipanarnevndini, 10. oktober 2019, har nevndin hevði viðmerkingar um, at málið var ikki nóg neyvt lýst. Eitt nú vóru ítøkiligu matr. nr. ikki nevnd í almennu lýsingini á heimasíðuni hjá kommununi og svørtu talvu, og heldur ikki ítøkiligu broytingarnar í byggisamtyktini.
Nevndin bað tí kommununa greiða nærri frá hesum, og vendi kommunan aftur við frágreiðing, sum býarskipanarnevndin hevur tikið til eftirtektar.

Samtykt av kommununi: 22. februar 2019
Framløga: 13. mai til 3. juni 2019
Sent Himr tilgóðkenningar: 15. juli 2019
Sent býarskipanarnevndini til góðkenningar: 6,.august 2019

**Mótmæli:** Onki mótmæli var til ætlaðu broytingarnar

**Tilmæli:** Nevndin samtykti ætlaðu broytingunum, men hevði viðmerkingar um, at ítøkiligar broytingar og matr. nr. eiga at framganga av almennu lýsingini, tá ið framtíðar ætlaðar broytingar verða lýstar í byggisamtyktini. Hetta fyri at tað skal verða so greitt sum gjørligt fyri borgarar at síggja, hvørt broytingarnar viðvíka teirra egnu ognum og hvat broytingarnar snúgva seg um.

Býarskipanarnevndin, 12. november 2019

Gunnvá S. á Lofti, formaður

Ari Johanneson, skrivari